TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 28.09.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, ~~Súsanna Bertholdsen~~

Varalimir: Eið Eidesgaard

Ikki møtt: Súsanna Bertholdsen, farloyvið

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 53/23 | 23/00308-1 | Fíggjarætlan 2024 |
| 54/23 | 23/00261-2 | TB-Flogbóltur umsókn um stuðul 2023 |
| 55/23 | 22/00325-2 | SUSVIM - Svimjikapping - loyvi til at lána hylin og fimleikarhøllina |
| 56/23 | 21/00187-19 | Umsókn um at keypa 39m2 frá kommununi |
| 57/23 | 23/00298-2 | Føroya Eftirskúli umsókn um stuðul sep. 2023 |
| 58/23 | 23/00199-2 | Tvøroyrar Býráð -Skipan samb. Kommunustýrislógini valskeiði 2020-2024 (§28 nýval av nevndarlimum til føstu nevndirnar) |
| 59/23 | 23/00149-1 | Lukka mál |
| 60/23 | 23/00272-2 | Lukka mál |
| 61/23 | 23/00268-2 | Lukka Mál |
| 62/23 | 23/00260-2 | Lukka Mál |
| **Til kunningar** | | |
| 19/23 | 23/00293-2 | BVT Suðuroyar Barnaverndartænasta -Hagtøl 2022 frá Barnaverndarstovu Føroya |
| 20/23 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |

| | | |
|---|---|---|
| 21/23 | 22/00051-1 | Lukka mál |
| | | |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um, at Súsanna Bertholdsen hevur hin 18. apríl 2023 fráboða farloyvið frá býráðnum.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkalla Eyð Eidesgaard, ið er fyrst (1) valdi tiltakslimurin á lista “C” Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 at møta til býráðsfundin.

Kristin Michelsen boðar frá, at Eyð Eidesgaard hevur frammanundan havt sæti í býráðnum, og tekur sostatt sæti í býráðnum uttan atkvøðugreiðslu.

Kristin Michelsen lesur skránna til býráðsfundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna –**ongin viðmerking**.

Til støðutakan

**53/23**
**23/00308-1 Fíggjarætlan 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 44/23 |
| 2 Býráðið | 28.09.2023 | 53/23 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 18.09.2023)**
Mælt verður til at Fíggjarætlan "FÆ2024" verður viðgjørd av Tvøroyrar býráð sum niðanfyri:

- 28. September, 1. viðgerð av fíggjarætlan "FÆ2024", har ásett verður barnafrádrátt og skattaprosent fyri 2024.
- 30. November, 2. viðgerð og endalig viðgerð av "FÆ2024"

Samb. Fráboðan frá TAKS, er skattainntøkur fyri 2024 mettar at blíva: **kr. 66.963.153,-**

Inntøkugrundarlagið er grunda á:
- Kommunuskattur 20,9%
- Barnafrádráttur kr. -7.000,-
- P/F skattur kr. 2.0 mió.

**Skattagrundarlag:**

| | | |
|---|---|---|
| A-inntøka: | 368.925.700,- | |
| B-Inntøka: | 19.692.300,- | 388.618.000 |
| | | |
| FAS-Inntøka: | (-6.987.393,-) | |
| Inntøkufrádr.: | (-805.600,-) | |
| Sjófrádr.: | (-2.360.679,-) | (-10.153.672,-) |
| Skattskyldug inntøka: | | 378.464.328,- |
| Botnfrádráttur: | | (40.253.070,-) |
| | | |
| **Inntøkugrundarlag:** | | **338.211.258,-** |
| Komm.skatt: (20,9%) | 70.686.153,- | |
| Barnafrádráttur: (384 x 7.000,-) | (-2.688.000,-) | |
| Pensionistafrár: (345 x 3.000,-) | (-1.035.000,-) | |
| **Netto A-skattur:** | | **66.963.153,-** |
| P/F Skattur: | 2.000.000,- | 2.000.000,- |
| | | |
| **Mettar inntøkur í alt (2024)** | | **68.963.153,-** |

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

- *Samb. løgtingslóg um kommunustýri er ásett í § 39, at fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
    - *Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.* ***Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.***

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan fyri 2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Einmælt samtykt at áseta fyri 2024 kommunuskatt á 20,9% og barnafrádráttur á kr. -7.000,-

**Býráðið 28. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttur á kr. -7.000,- fyri 2024.

**54/23**
**23/00261-2 TB-Flogbóltur umsókn um stuðul 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 22.08.2023 | 58/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 54/23 |
| 3 Býráðið | 28.09.2023 | 54/23 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá TB-Flogbóti til kappingarárið 2023/2024.

Upplýsast kann at TB-Flogbóltur hevur fingið í stuðul frá Tvøroyrar kommunu sum niðanfyri:

- 2019 kr. 110.000,-
- 2020 kr. 130.000,-
- 2021 kr. 130.000,-
- 2022 kr. 130.000,-

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022, 524 20. Stuðul til ítrótt

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 22. august 2023:**
Einmælt samtykt at veita í stuðul kr. 130.000,- málið verður beint í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini

**Býráðið 28. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini

**55/23**
**22/00325-2 SUSVIM - Svimjikapping - loyvi til at lána hylin og fimleikarhøllina**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 25.08.2022 | 72/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 12.09.2023 | 63/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 50/23 |
| 4 Býráðið | 28.09.2023 | 55/23 |

**Málslýsing:**
Soljóðandi teldubræv er komið frá SuSvim:
Leygardagin tann 29. oktober 2022 ætlar SuSvim at hava eina svimjikapping fyri yngru svimjarunum í hylinum á Tvøroyri, og vilja vit við hesum biðja um loyvi til at lána hylin hendan dagin.

Eisini hevði verið gott, um vit kundu brúkt fimleikarhøllina, tí nógv fólk møta og plássið í svimjihøllini er lítið. Tað verður eisini so heitt inni og tá er gott at sleppa í fimleikarhøllina. Har sleppa fólk at seta seg niður og kunnu keypa sær kaffi og kaku.

Vinarliga, SuSvim

**Mentanarnevndin 25. august 2022:**
Einmælt samtykt at ganga umsóknini á møti.

**Kommunustjórin 29. aug. 2023:**
Umsitingin hevur hin 29. aug. 2023, móttikið teldupost frá Susvim, sum spyr um loyvið at venja í svimjuhylinum í Tvøroyrar skúla.

Susvim skriva í umsóknini:

> *SuSvim kundi hugsað sær at vant í hylinum á Tvøroyri annanhvønn mánadag frá kl. 17 til uml. 19.30.*
> *Fleiri orsøkir eru til tað:*
> *- Hylurin er sera væl egnaður at venja serliga vendingar í. Men eisini ymiskt annað. Tey vóru sera glað fyri venjingarnar, ið vóru á Tvøroyri, tá ongin hiti var í Pálshøll.*
> *- Eldru svimjararnir møta teimum yngru á Tvøroyri, ið venja beint áðrenn. Tey yngru síggja upp til tey eldru, og vónandi eggjar teimum yngru at halda seg til svimjingina.*
> *- Tey byrja við at renna inneftir Ovaravegi og niðan Sjúkrahús Sjúkrahúsbrekkuna. Soatatt eru tey eisini sjónlig á vegnum.*
> *- Svimjararnir av Tvøroyri sleppa undan koyring hesar dagar.*
> *Vit vilja við hesum spyrja, um vit kunnu brúka hylin annanhvønn mánadag (ólíka viku) ?*
>
> *Vinarliga, Vegna SuSvim*

**Mentanarnevndin 12. september 2023:**
Einmælt samtykt at geva SUSVIM atgongd til svimjuhylin á skúlanum á Tvøroyri til teirra venjingar í samráð við húsavørðin og uttan kostnað.

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 28. september 2023:**
Einmæt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini

**56/23**

## 21/00187-19 Umsókn um at keypa 39m2 frá kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.09.2023 | 34/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 56/23 |
| 3 Býráðið | 28.09.2023 | 56/23 |

**Málslýsing:**
Jón Magnusarson Ellendersen ynskir at keypa 39m2 frá vegøkinum Í Húsgarði:




**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Prísuppskot: 3900 kr + útreiðslur til marknaumskipan

**Tilmælið:**
Økið liggur longu sum partur av úrtagarðinum hjá Jón og Rúnu, so mælt verður til at selja teimum stykkið.

**Tekniska nevnd 13. september 2023:**
Samtykt at selja til samans 39m2 frá vegøki "a" og "b" til Jón Magnusarson Ellendersen, og fremja marknaumskipan við matr. nr. 51e.

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Tekniskunevnd.

**Býráðið 28. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd og fíggjarnevndini

**57/23**
**23/00298-2 Føroya Eftirskúli umsókn um stuðul sep. 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 12.09.2023 | 68/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 52/23 |
| 3 Býráðið | 28.09.2023 | 57/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.09.2023**
Umsitingin hevur móttikið umsókn dagf. 4. Sep. 2023 frá Føroya Eftirskúla um stuðul.

Skúlaleiðarin skrivar m.a. í umsókníni at:

> *Eg vil við hesum spyrja um møguleikan fyri at endurnýggja avtaluna sum bleiv gjørd 7. juni 2021 í samráð við Tvøroyrar kommunu og Mentamálaráðið so henda avtala eisini er galdandi fyri skúlaárini 2021/2022, 2022/2023 og 2023/2024.*
>
> *Stuðulin og vælvildin frá Tvøroyar Kommunu hevur verði avgerðandi fyri hetta nýskapandi virksemi og vóna okur at tilboðið fer at mennast í okkara kommunu í komandi árum og at okur her á Tvøroyri eru við í fremstu røð nú millumannað 10. flokkarnir í skúlunum runt um landið fáa stóra kapping frá øllum tilboðum í nú eru til tey ungu!*

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 12. september 2023:**
Mentanarnevndin mælir einmælt til, at leigusáttmálin verður endurskoðaður, við atliti til styttri uppsøgn, við atliti til, at Tvøroyrar kommuna møguliga sjálv skal brúka hølini. Forkv. mælir til at Føroya Eftirskúli framhaldandi skal gjalda fyri leigu, hetta tekur Jónleyg Bech undir við. Bjarni Hammer mælir til, at Føroya Eftirskúli leigar hølini á Sjógøtu 2, uttan at gjalda fyri leigu, ljós og hita. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Atkvøtt verður um tilmælið hjá Bjarna Hammer um at leingja leigusáttmálan við Føroya Eftirskúla av Sjógøtu 2 skúlaárið 2023/2024 uttan at innheinta leigukostnað. Fyri eru Bjarni Hammer og Kristin Michelsen; ímóti Jónleyg J. Bech. –uppskotið samtykt.

Atkvøtt verður um tilmælið hjá forkv. í mentanarnevndini at leingja leigusáttmálan við Føroya Eftirskúla av Sjógøtu 2 skúlaárið 2023/2024 og at Føroya Eftirskúla verður at gjalda leigu til Tvøroyrar kommunu: Fyri eru Jónleyg J. Bech; ímóti eru Bjarni Hammer og Kristin Michelsen. –uppskotið fallið.

**Býráðið 28. september 2023:**
Atkvøtt verður um tilmælið hjá fíggjarnevndini:
Fyri eru: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Eidesgaard
Ímóti eru: ongin
Blankt: Jónleyg Jespersen Bech og Anita Vibergsdóttir
Uppskotið samtykt

**58/23**

**23/00199-2 Tvøroyrar Býráð -Skipan samb. Kommunustýrislógini valskeiði 2020-2024 (§28 nývál av nevndarlimum til føstu nevndirnar)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.05.2023 | 42/23 |
| 2 Býráðið | 28.09.2023 | 58/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.05.2023**
Borgarstjórin mælir til at velja nevndirnar av nýggjum, nú býráðslimur –Súsanna Berholdsen- hevur fráboða farloyvið, og ikki fær røkt sítt starv sum býráðslimur í tíðarskeið longi enn 14 samfullar dagar.

-og

28. august 2023, fráboðan er komin frá Jónleyg J. Bech, um at hon tekur seg úr valbólki "B" í Tvøroyrar býráð

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin)

1. ***§ 18.*** *Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð. Er eingin kommunustýrislimur, sum kann seta fram krav um at geva tiltakslimi fundarboð, kann tiltakslimurin sjálvur krevja at fáa fundarboð.*
   - *Stk. 2. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, <u>skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.</u>*
   - *Stk. 3. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

   ***§ 19.*** *Tá ið kommunustýrislimur aftur er førur fyri at luttaka, fer innkomin tiltakslimur út.*

**§28 Nevndir**

2. ***§ 28.*** *Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.*
   - *Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. <u>Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.</u>*
   - *<u>Stk. 3. Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.</u>*
   - *Stk. 4. Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.*

**Kommunustýrisskipan hjá Tvøroyrar Kommunu dagf. 20. Apríl.2021, samtykt á býráðsfundi 24. Apríl 2021.**

3. **§ 8, 4. petti.** Tað er valbólkurin, sum avgerð, hvør tekur sæti í nevndum, antin valdur- ella eykavaldur kommunustýrislimur, tá fasti limurin og varalimurin hava forfall.
4. **§20 , 1. petti.** Hesar føstu nevndir skulu verða valdar:
   - Sosiala nevnd
   - Tekniska nevnd
   - Mentanarnevnd
   - Vinnu- og havnanevnd
   - Trivnaðar- og umhvørvisnevnd

**Tilmælið kommunustjórin 01. mai. 2023:**

1. **Kommunustjórin mælir býráðnum at boða frá valbólkum.**
   - Sambært § 3 í kommunustýrislógini er ásett, við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.

2. **Kommunustjórin mælir býráðnum velja umboð í fíggjarnevndina**
   - \- veljast skullu 2 limir og 3 tiltakslimum -(borgarstjórin er føddur formaður í nevndini) (Lutfalsval).
   - **§ 38.** Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar. Borgarstjórin er nevndarformaður.

3. **Kommunustjórin mælir býráðnum velja 3 limir og 3 tiltakslimir í §28 nevndirnar:**
   - Sosilau nevnd
   - Teknisku nevnd
   - Mentanarnevndina
   - Vinnu og havnanevndina
   - Trivnaðar og umhvørvisnevndina

4. **Kommunustjórin mælir býráðnum velja 3 limir og 3 tiltakslimir í §28 nevndirnar:**
   *§ 8, 4. petti. Tað er valbólkurin, sum avgerð, hvør tekur sæti í nevndum, antin valdur- ella eykavaldur kommunustýrislimur, tá fasti limurin og varalimurin hava forfall. §30, 1. petti.*

   **Hesar føstu nevndir skulu verða valdar:**
   - §30 Skattakærunevndina fyri Suðuroynna, 2 limir og 2 varalimir
     - *(Tær kommunalu skattakærunevndirnar verða tiknar av 1. januar 2025)*
   - §31 Barnaverndarnevndina, 1 limur og 1 varalimur
   - §32 Tilbúgvingarnevndin, borgarstjórin er føddur form. og vera fyri uttan borgarstjóran valdir 2 limir og 3 varalimir.
   - §33 Ferðslunevndin –somu limir sum í teknisku nevnd, umframt 1 umboð fyri løgregluna og 1 varaumboð fyri løgregluna, 1 umboð fyri koyrilærarnar og 1 varaumboð fyri koyrilærarnar.

- §34
    - Stk.1 Skúlastýrið, 2 limir og 2 varalimir
    - Stk.2 Kommunufelagið Borgarstjórin er føddur limur
    - Stk.3 Suðuroyar ferðavinnufelag, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.4 Valnevndin, 5 limir og 5 varalimir
    - Stk.5 Musikkskúlin fyri Suðuroy, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.6 Snaran, 2 limir og 2 varalimir
    - Stk.7 Tvøroyrar Bygda- og sjóvinusavn 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.8. Skjalasavið, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.9 Umboð í IRF, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.10 Umboð í SEV, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.11 Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, 1 limur og 1 varalimur
    - Stk.12 Suðuroyar Bú- og Heimatænastu, Borgarstjórin er føddur limur, og umframt verður valdur 1 limur og 1 varalimur

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið tikið av skrá.

**Kommunustjórin 19. september 2023**
Mælt verður til at fráboða valbólkar samb. kommunustýrislógina kap1. §3; at velja limir í fastar nevndir, samb, kap 6. §28 í kommunustýrislógini; og at velja limir og umboðan í aðrar nevndir samb. kap 7. §35 í kommunustýrislógini.

**Býráðið 28. september 2023:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri boðar frá, at sambært kap.1 § 3 í kommunustýrislógini er ásett, at kommunustýrislimir skulu frammanundan boða borgarstjóranum frá, um teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.

**Kristin Michelsen** mælir til, at allir kommunustýrislimir ganga saman í ein og sama felags valbólk.
**Einmælt samtykt.**

## NEVNDIR, SAMB. KAP.6, Í KOMMUNUSTÝRISLÓGINI

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum.

**Kristin Michelsen** mælir til, at velja kommunustýrislimir í føstu nevndinar samb. Kap.6, §28 í kommunulógini og skjýtir upp:

**Fíggjarnevndin:** Val av 2 limum og 3 tiltakslimur til fíggjarnevndina. - *(borgarstjórin er føddur formaður í fíggjarnevndini);* **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at fíggjarnevndin verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Anita Vibergsdóttir |
| Kristina Roest | Alvi Mortensen |
| Bjarni Hammer | Eyð Eidesgaard |

**Einmælt samtykt**

**Sosiala nevnd:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; **Eyð Eidesgaard** skjýtur upp, at sosiala nevnd verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Jónleyg J. Bech | Bjarni Hammer |
| Anita Vibergsdóttir | Kristina Roest |
| Eyð Eidesgaard | Alvi Mortensen |

**Einmælt samtykt**

**Teknisku nevnd:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; **Bjarni Hammer** skjýtur upp, at tekniska nevnd verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Alvi Mortensen | Bjarni Hammer |
| Kristina Roest | Jónleyg J. Bech |
| Eyð Eidesgaard | Anita Vibergsdóttir |

**Einmælt samtykt**

**Mentanarnevndina:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; **Alvi Mortensen** skjýtur upp, at mentanarnevndin verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Bjarni Hammer | Anita Vibergsdóttir |
| Eyð Eidesgaard | Alvi Mortensen |
| Jónleyg J. Bech | Kristina Roest |

**Einmælt samtykt**

**Vinnu og havnanevndina:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; **Jónleyg J. Bech** skjýtur upp, at vinnu- & havnanevndin verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Anita Vibergsdóttir | Eyð Eidesgaard |
| Bjarni Hammer | Alvi Mortensen |
| Kristina Roest | Jónleyg J. Bech |

**Einmælt samtykt**

**Trivnaðar og umhvørvisnevndina:** Val av 3 limum og 3 tiltakslimum; **Anita Vibergsdóttir** skjýtur upp, at vinnu- & havnanevndin verður umboða av:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristina Roest | Jónleyg J. Bech |
| Eyð Eidesgaard | Alvi Mortensen |
| Bjarni Hammer | Anita Vibergsdóttir |

**Einmælt samtykt**

## AÐRAR NEVNDIR OG UMBOÐAN, SAMB. KAP.7, Í KOMMUNUSTÝRISLÓGINI

**§ 35.** Har kommunustýrið eftir øðrum reglum ella fyriskipanum skal vera umboðað í øðrum nevndum ella tílíkum, og kommunustýrið bert skal velja eitt umboð, fer valið fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Skulu fleiri umboð verða vald, fer valið fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**Kristin Michelsen** mælir til, at velja umboð í aðrar nevndir samb. Kap.7, §35 í kommunustýrislógini og skjýtir upp:

**Skattakærunevndina:** Fyri Suðuroynna, 2 limir og 2 tiltakslimur, *(Verður avtikin 1. Jan. 2025);* **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at skattakærunevndin verður óbroytt og uboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Fríðgerð Mortensen | Eyðbjørg Gaard Midjord |
| Jens Johannesen | Hallur í Heiðunum |

**Einmælt samtykt**

**Barnaverndarnevndina:** Val av 1 limur og 1 tiltakslimur; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at barnaverndarnevndin verður óbroytt og umboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Steingrím Niclasen | Marjun Olsen |

**Einmælt samtykt**

**Tilbúgvingarnevndin:** Borgarstjórin er føddur form. og vera fyri uttan borgarstjóran 2 limir og 3 tiltakslimur; **Kristina Roest** skjýtur upp, at tilbúgvingarnevndin verður umboða av:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Bjarni Hammer |
| Alvi Mortensen | Kristina Roest |
| Eyð Eidesgaard | Jónleyg J. Bech |

**Einmælt samtykt**

**Ferðslunevndin:** Somu limir sum í teknisku nevnd, umframt 1 umboð fyri løgregluna og 1 varaumboð fyri løgregluna, 1 umboð fyri koyrilærarnar og 1 vara-umboð fyri koyrilærarnar; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at barnaverndarnevndin verður óbroytt og uboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Alvi Mortensen | Bjarni Hammer |
| Kristina Roest | Jónleyg J. Bech |
| Eyð Eidesgaard | Anita Vibergsdóttir |
| Jaspur Vang | Johannes Magnussen |
| Alvi Mortensen | Áki Dimon |

**Einmælt samtykt**

**Skúlastýrið:** 2 limir og 2 tiltakslimur; **Bjarni Hammer** skjýtur upp, at skúlastýrið verður umboða av:

| **Fastur limur** | **Tiltakslimur** |
|---|---|
| Eyð Eidesgaard | Anita Vibergsdóttir |
| Bjarni Hammer | Alvi Mortensen |

**Einmælt samtykt**

**Valnevndin:** 5 limir og 5 tiltakslimur; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at valnevndin verður óbroytt og umboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Jean Dimon | Otto Gram |
| Mariann Mikkjalsdóttir | Mina Joensen |
| Armgarð Sørensen | Ronald Robertson |
| Jonhild Andreasen | Malla Dam |
| Diana Heinesen | Annika Eidesgaard |

**Einmælt samtykt**

**Musikkskúlin fyri Suðuroy:** 1 limur og 1 tiltakslimur; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at umboði fyri musikkskúlan verður óbroytt og umboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Pól Arni Holm | Anita Vibergsdóttir |

**Einmælt samtykt**

**Tvøroyrar Bygda- og sjóvinusavn:** 1 limur og 1 tiltakslimur; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at umboði fyri Tvøroyrar Bygda- og sjóvinusavn verður óbroytt og umboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kári Jespersen | Chris Jan Michelsen |

**Einmælt samtykt**

**Skjalasavnið:** 1 limur og 1 tiltakslimur; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at umboði fyri Skjalasavnið verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Bjarni Hammer | Anita Vibergsdóttir |

**Einmælt samtykt**

**Umboð í IRF:** 1 limur og 1 tiltakslimur; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at umboði fyri IRF verður óbroytt og umboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Anita Vibergsdóttir | Kristin Michelsen |

**Einmælt samtykt**

**Umboð í SEV:** 1 limur og 1 tiltakslimur; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at umboði fyri SEV verður óbroytt og umboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Alvi Mortensen | Anita Vibergsdóttir |

**Einmælt samtykt**

**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim:** 1 limur og 1 tiltakslimur; **Kristin Michelsen** skjýtur upp, at umboði fyri Suðuroyar Ellis- og Røktarheim verður óbroytt og umboðini framhaldandi verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Alvi Mortensen |

**Einmælt samtykt**

**BHS, Suðuroyar Bú- og Heimatænastu:** 1 limur og 2 tiltakslimur *(borgarstjórin føddur limur)*; **Alvi Mortensen** skjýtur upp, at umboði fyri BHS, Suðuroyar Bú- og Heimatænastu verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Anita Vibergsdóttir |
| Eyð Eidesgaard | Kristina Roest |

**Einmælt samtykt**

**Barnaverndarstýrið:** 1 limur og 1 tiltakslimur; **Anita Vibergsdóttir** skjýtur upp, at umboði Barnaverndarstýrið verða:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Jónleyg J. Bech | Eyð Eidesgaard |

**Einmælt samtykt**

**FSR** *(Bygginevnd fyri bygging av nýggjum kappróðrarneystið á Hvítanesi):* 3 limur og 1 tiltakslimur, umframt form. í FSR;
**Kristin Michelsen** skjýtur upp, at viðkað bygginevndina til 4 býráðslimir og 1 tiltakslim, umframt form. í FSR, og 1 Ráðgeva umboði:

| Fastur limur | Tiltakslimur |
|---|---|
| Kristin Michelsen | Anita Vibergsdóttir |
| Bjarni Hammer | |
| Jónleyg J. Bech | |
| Kristina Roest | |
| Rógvi Thorsteinsson | |
| Linn Augustinussen | |

**Einmælt samtykt**

**59/23**
**23/00149-1 Lukka mál**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 19.04.2023 | 16/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 25/23 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 22.05.2023 | 20/23 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 14.06.2023 | 26/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.06.2023 | 40/23 |
| 6 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 46/23 |
| 7 Vinnu- og havnanevndin | 13.09.2023 | 30/23 |
| 8 Býráðið | 28.09.2023 | 59/23 |

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Einmælt samtykt at beina málið í býráðið

**60/23**

**23/00272-2 Lukka Mál:**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.09.2023 | 35/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 58/23 |
| 3 Býráðið | 28.09.2023 | 60/23 |

**Málslýsing:**

F

**61/23**

**23/00268-2 Lukka Mál**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 13.09.2023 | 11/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 55/23 |
| 3 Býráðið | 28.09.2023 | 61/23 |

**Má**

K

**Lógargrundarlag:** *Løgtingslóg u*

**T**

røkkast. –málið verður beint í býráðið sum lukka mál.

**Býráðið 28. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini

**62/23**

**23/00260-2 Lukka mál**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 45/23 |
| 2 Býráðið | 28.09.2023 | 62/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 7. Aug. 2023**

"

*a)*
*b)*
*c)*

*8.*

**F**

ar ei yvi ur a ta

**Býráðið 28. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Til kunningar**

**19/23**
**23/00293-2 BVT Suðuroyar Barnaverndartænasta -Hagtøl 2022 frá Barnaverndarstovu Føroya**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 13.09.2023 | 8/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 10/23 |
| 3 Býráðið | 28.09.2023 | 19/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.09.2023**
Til kunning og umrøðu er frágreiðing frá Barnaverndarstovu Føroya fyri 2022, grundað á hagtøl frá barnaverndartænastunum og fosturforeldraskipanini

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til kunning og umrøðu.

**Sosiala nevnd 13. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

## 20/23
## 23/00044-1 Skattatøl 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 4/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 6/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 5/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 9/23 |
| 7 Fíggjarnevndin | 31.05.2023 | 6/23 |
| 8 Býráðið | 31.05.2023 | 13/23 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.06.2023 | 7/23 |
| 10 Býráðið | 19.06.2023 | 18/23 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 8/23 |
| 12 Býráðið | 28.09.2023 | 20/23 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 01.02.2023
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2022/2023

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 20. februar 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. apríl 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 19. juni 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 19. juni 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. september 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**21/23**

**22/00051-1 Lukká mál**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.01.2022 | 3/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 08.02.2022 | 8/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 08.03.2022 | 35/22 |
| 4 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 16/22 |
| 5 Mentanarnevndin | 12.09.2023 | 70/23 |
| 6 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 49/23 |
| 7 Býráðið | 28.09.2023 | 21/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.01.2022**

gj u

mentanarne mi ıðgerða ætlani a.

**Mentanarnevndin 08. februar 2022:**
E

Fundurin lokin kl. 18:45

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Eyð Eidesgaard